Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Steffan Klein Poulsen, løgtingsmaður

Svarari: Bjarni Kárason Petersen, landsstýrismaður í lógarmálum

Evni: Heimild til at logga dátur

Spurningar:

1. Verður arbeitt við at seta reglur í gildi, sum svara til reglurnar í donsku "logningsbekendtgørelsen"?
2. Um ja, hvat restar í fyri at koma á mál við hesum?
3. Um nei, hvør er orsøkin til, at landsstýrismaðurin ikki ynskir at seta tílíkar reglur í gildi?

Viðmerkingar:
"Logningsbekendtgørelsen" er ein donsk kunngerð, sum hevur heimild í rættargangslógini, og sum áleggur telesambands- og internetveitarum at goyma (logga) upplýsingar um samskifti hjá brúkarunum. Ikki sjálvt innihaldið, men metadata, t.e. hvør samskiftir, nær, hvar og við hvønn.

Fyrr vóru allar ip-adressur statiskar. Hesar eru tó avmarkaðar í tali, og tí eru flestu ip-adressurnar vorðnar dynamiskar fyri at nøkta tørvin hjá stóra talinum av brúkarum á internetinum. Hetta er ein teknisk loysn, sum ger tað trupult at spora seg fram til brotsmenninar á netinum, um ikki dáturnar eru goymdar (loggaðar).

Heimildin er partur av eftirlitinum í Danmark, sum skal hjálpa løgregluni og fregnartænastuni at loysa álvarsligan kriminalitet, t.d. yvirgang, skipaðan kriminalitet og ikki minst mál um barnaporno, sum er ein alsamt vaksandi trupulleiki. Eisini her í Føroyum.

Fyrispurningurin verður settur fyri at fáa greiðu á, um og nær "logningsbekendtgørelsen" verður sett í gildi í Føroyum.

Á Løgtingi, 23. juni 2025

Steffan Klein Poulsen